**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1102**
**Tíðarskeið 16/02-21/02-2011**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Rógvi Mouritsen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu og WP2-glúpur.

**Um túrin:** Vit fóru út mikudagin 16/2 kl.2345. Siglt varð eystur á støð N1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar norðureftir, vit tóku allan skurðin, norður á 64°30N.
Tá liðugt var at taka støðir á skurði N, sigldu vit vestur á støð V19 norður av Føroyabanka. Har byrjaðu vit skurð V og hildu so fram við skurðinum inn ímóti Trøllhøvda.
Tá hesin skurður var liðugur, varð siglt suður á Munkagrunnin. Vit tóku skurð S av Munkagrunninum og móti Hetlandi, men bert til markið. Haðani sigldu vit so norður á skurð E, sum vit tóku inn móti Nólsoy.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekk væl, hóast veðrið var vánaligt onkran dag á túrinum.
Vit vóru aftur á Havnini mánadagin 21/2 kl. 1700.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 58 støðir og saltprøvar á øllum. Við glúpinum tóku vit 48 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í vár.

**Viðmerkingar:** Innast á skurði V tóku vit 10 eykastøðir, fimm millum støð V1 og V2, og fimm millum støð V2 og V3.

23-2-2011 ____________________________

Regin Kristiansen